

*Fá roknaðu undan ársskiftinum við, at Lars Løkke Rasmussen hevði nakran møguleika at vinna næsta fólkatingsval, men eftir nýggjársrøðuna 1. januar 2011 halda fleiri, at hann væl kann vinna valið*

**MYND:** POLFOTO

tí hvørt eygnabrá verður varpað út í hvørja stovu, og hvør setningur verður vigaður við stovuborðini, har veljararnir umhugsa, hvussu teir ætla at brúka sína atkvøðu.

– Eg haldi, tú brúkar eina rúgvu av lýsingarorðum, segði Lars Løkke Rasmussen við Helle Thorning-Smith, sum hinvegin gjørdi greitt, at borgarliga stjórnin eigur ábyrgdina av, at almennu útreiðslurnar eru vaksnar alt ov nógv seinastu níggju árini.

– Eg skrivi ikki søgubøkur, men politiska søgu, svaraði Lars Løkke Rasmussen, sum speiskur legði aftrat, at Helle Thorning-Smith misbrúkar sítt talent og hevur deponerað sín avgerðarrætt hjá fakfeløgunum. Tá Helle Thorning-Smith so segði, at hon tímdi ikki í smálutir at umrøða sítt egna fíggjarliga útspæl, var Lars Løkke skjótur at svara, at tað mátti ikki verið so trupult at sett seg inní, tí alt stóð á síðu 15 í hennara uppleggi.

Tann viðmerkingin sveið ivaleyst, men eftir stóð tó myndin hjá Helle Thorning-Smith av einum 33 ára gomlum postmanni, ið skuldi standa uppi í nærum 40 ár aftrat og lyfta tungar kassar, tí Lars Løkke vil avtaka eftirlønina.

### Pittelkow feldi dóm

Politiskir viðmerkjarar ljóða ofta sum fótbóltsviðmerkjarar, tá teir umrøða hólmgongur millum politiskar leiðarar. Politiski substansurin verður sjóðaður niður í útsagnir um, nær fólk hugdu upp ella niður, og at enda verður útnevndur ein vinnari, um viðmerkjararnir annars ikki kunngera, at dysturin endaði við javnleiki.

Spennandi var at síggja, hvussu politisku viðmerkjararnir fóru at umrøða hólmgonguna millum Lars Løkke Rasmussen og Helle Thorning-Smith, og áhugavert var at staðfesta, at teir vóru varnari í sínum niðurstøðum, enn teir plaga at vera. Hans Engell helt gamaní í Ekstra Blaðnum, at Lars Løkke vann, men fleiri donsk bløð høvdu viðmerkingar frá viðmerkjarum, ið vóru ósamdir, og so staðfestu tey bara, at ósemja var um niðurstøðuna.

> **Eg skrivi ikki søgubøkur, men politiska søgu, svaraði Lars Løkke Rasmussen, sum speiskur legði aftrat, at Helle Thorning-Smith misbrúkar sítt talent og hevur deponerað sín avgerðarrætt hjá fakfeløgunum**

Kanska vísir hetta, at fjølmiðlarnir óttast almikið at verða hongdir út sum ov bláir ella ov reyðir, nú valið nærkast, og valfepurin er um at koma í hæddina.

Ein, sum tó ikki helt seg aftur at útnevna ein vinnara í sjónvarpskjakinum, var Ralf Pittelkow, viðmerkjari hjá Jyllands-Postinum. Hann hevur altíð verið meira borgarliga sinnaður enn reyður, og í Jyllands-Postinum mánadagin spurdi hann rætt og slætt, um Helle Thorning-Smith er før fyri at stjórna Danmark.

Pittelkow staðfesti, at Helle Thorning-Smith hevur leingi havt viðgongd í veljarakanningunum og samstundis nærum fingið frið frá fjølmiðlunum. Tí hevur hon kunnað endurnýtt slitnar orðingar úr skuffuni hjá spinndoktaranum um, at borgarliga stjórnin gevur teimum ríkastu skattalættar.

Men sunnukvøldið var øðrvísi. Lars Løkke líktist einum manni við eini sak, og jú longri og skjótari Helle Thorning-Smith tosaði, jú meira trokaði spurningurin seg á, um hon er før fyri at stjórna Danmark. Hon kundi ikki siga, hvussu danskarar skulu fáast at arbeiða meira, tí tað skuldi hon tosa við fakfeløgini um fyrst, vísti Pittelkow á, og heldur ikki kundi hon siga, hvussu almenni sektorurin skal effektiviserast. Haraftrat avnoktaði hon mestsum, at hon ætlar at hækka summar skattir, hóast andstøðan sjálv hevur skotið hetta upp.

### Fólk broyttu hugsan

Sosialdemokratar taka als ikki undir við Ralf Pittelkow og halda hann gera Helle Thorning-Smith órætt, tí í løtum beit hon dyggiliga frá sær og gav Lars Løkke Rasmussen turt uppá. Men alt bendir á, at nýggjársrøðan hjá Lars Løkke og hólmgongan dagin eftir hava givið forsætisráðharranum so góðan byr, sum hann ikki hevur havt áður yvirhøvur.

Ein veljarakanning vísti 2. januar, at 48 prosent av veljarunum eru ímóti at avtaka eftirlønina, meðan 41 prosent eru fyri tí. Undirtøkan fyri at avtaka eftirlønina er sostatt vaksin almikið, síðan bara 15 prosent vildu avtaka hana í 2005.

Ein onnur veljarakanning hjá Megafon 3. januar vísti, at ætlanin hjá Løkke at koma burtur úr búskaparkreppuni hevur størri undirtøku enn ætlanin hjá Helle Thorning-Smith, meðan Helle Thorning-Smith hevði størri undirtøku sum statsleiðari. Men 4. januar vísti ein veljarakanning hjá Gallup, at 44 prosent av veljarunum vildu hava Lars Løkke sum forsætisráðharra og 39 prosent Helle Thorning-Smith. Ein meiriluti helt eisini Løkke duga betur at handfara kreppur, meðan ein meiriluti helt Helle Thorning-Smith vera meira sympatiska.

So hvat er hent síðan á nýggjárinum? Lars Løkke Rasmussen hevur á fyrsta sinni víst, at hann ikki bara ætlar at sita og sóla sær í einum arvaðum forsætisráðharrasessi og lata andstøðuna og fjølmiðlarnar seta dagsskránna. Hann hevur nú sjálvur sett dagsskránna og kundi tí við sínum eftirlønaruppskoti fara áloypandi til verka og krevja av andstøðuni, at hon svaraði, hvussu hon vil loysa búskaparligu trupulleikarnar hjá Danmark.

Eftir veljarakanningunum at døma halda danskarar framvegis ikki, at Lars Løkke Rasmussen hevur heimsins størstu atdráttarmegi, men vinnur hetta atkvøður at enda? Kann hugsast, at veljararnir heldur vilja hava greiða talu og fastleika í ovastu politisku leiðsluni, og at politiska leiðslan skal kunna virka óheft av mongu treytunum hjá fakfelagsrørsluni? Og um so er, at vinstravongurin kortini ikki vinnur næsta fólkatingsval, kemst tað so av, at sosialdemokratiska verkætlanin at uppbyggja vælferðarsamfelagið farnu øldina hevur sigrað, men sigrað so nógv, at flokkurin, ið skapti vælferðarmodellið, ikki longur fær treytaleysa løn fyri arbeiðið?

Spenningurin økist ið hvussu er, og kanska í apríl ella mai fæst at vita, hvør hevur størstu slagkraftina, Lars Løkke Rasmussen ella Helle Thorning-Smith.